


Ali al-Naimi, oljumálaráðharri í Saudi -Arabia, vil ikki geva USA, Russlandi og Brasil møguleikan at fara avstað við oljumarknaðinum. Mynd: EPA/HERBERT PFARRHOFER

# OPEC minkar ikki um oljuframleiðsluna - óansæð oljuprís

**Jógvan Hugo Gardar**

23.12.2014 - 11:16

Oljan.fo

Oljuprísurin kann lækka til 20 dollarar fyri fatið, og vit í OPEC fara at framleiða tað sama. Vit minka ikki um oiljuframleiðsluna, óansæð prís, sigur oljumálaráðharrin hjá saudi-Arabia, Ali al-Naimi, í eini samrøðu við Middle east Economic Survey.

Hann ger púra greitt um nakar vil hava ein hægri oljuprís, so noyðast londini uttanfyri OPEC at minka um sína framleiðslu, fyri at trýsta prísin upp

- OPEC-londini hava ikki áhuga í at minka um framleiðsluna, óansæð prísleguna. Um prísurin lækkar til 20, 30, 50 ella 60 dollarar, det hevur onki at siga, sigur al-Naimi.

Hann sigur seg óttast at USA, Russland ella Brasil bara fara at nýta høvi at tryggja sær ein størri part av marknaðinum, um Saudi-Arabia minkar um sína framleiðslu.

Oljugreinarin Jamie Webster verður í Financial Times endurgivin fyri at siga, at tann støðan sum al-Naimi vísir, er størsta broytingin vit hava sæð í OPEC síðani sjeytiárini